# (K)OLLSIGLDI



Heini í Skorini og Sorin Anghel dystast

Mynd: Álvur Haraldsen

lagsmenn fingu ongantíð ferð á sítt spæl. Stríshugaðu miðvallarnir, Klæmint Matras og Heini í Skorini, vunnu fleiri nærdystir, og EB/Streymur fekk sjáldan gagn av bóltførleikanum hjá Hans Paula Samuelsen.

**Við yvirlutan**

B36 var meira á bóltinum fyri steðgin. Spælið var hinvegin lítið skipa, og tað tóktist torført at fáa tamarhald á bóltinum, sum ferðast skjótt á váta graslíkinum. Sundalagsmenn vóru stinnir og góvu mótstøðumonnunum lítið pláss. Einasta hóttanin var, tá Heini í Skorini fór til stroks, sneiddi fram við mótstøðuleikara og smekkaði til, væl uttan fyri brotsteigarmarkið. René Torgarð stýrdi bóltinum til hornaspark.

John Petersen er greiður.

– Vit eru omaná í fyrra hálvleiki, men seta ongantíð málverjan hjá teimum undir veruligt trýst. Vit eru nær við eftir steðgin, men teir hava eisini møguleikar at økja um leiðsluna, sigur hann.

B36 setti EB/Streym undir eitt sjálvsagt trýst seinastu løtuna. Gestirnir vildu verja sína leiðslu, meðan heimaliðið visti fullvæl, at eydnaðist tað ikki at fáa mál nú, so høvdu teir ongan leiklut í fjórðingsfinalunum. Seinasta royndin var at flyta verjuspælaran Jonas Flindt Rasmussen fram í álopið, men tað bøtti lítið um støðuna.

Innskifti Bárður Olsen økti um leiðsluna í tíðini, dómarin hevði lagt afturat. Miðvallarin, sum spældi við B36 í fjør, fekk bóltin á brotsteigarmarkinum eftir skjótálop og smekkaði til. Meinhardt Joensen hevði ongan møguleika at verja fyri.

*uni@sosialurin.fo*

## Tí fór Anghel av vøllinum

Øll fingu ein skelk, tá Sorin Anghel brádliga fall í óvit, tá sjey minuttir restaðu í av vanligu leiktíðini í gjár. Hann varð fluttur av vøllinum alt fyri eitt. Hann fekk ein albogan undir vangan í einum nærdysti og misti viti.

Anghel varð fluttur á sjúkrahús, men hann er komin fyri seg. Bárður Olsen, sum økti um leiðsluna, loysti hann av.



Mynd: Álvur Haraldsen

# Cieslewicz verður ein fongur

**FÓTBÓLTUR Lukasz Cieslewicz royndi at bjóða av, men var ikki so eyðsýndur í gjár. Hann verður ein fongur, er John Petersen sannførdur um**

Uni Holm Johannesen

Tað verður nógv væntað av 23 ára gamla Lukasz Cieslewicz, sum spældi sín fyrsta skrásetta dyst fyri B36 í gjár. Pólski framherjin gjørdi greitt í viðtalu við fótbóltsblaðið hjá Miðlahúsinum í síðstu viku, at hann ætlar sær ikki at vera leingi í Føroyum. Ambitiónirnar eru hægri enn so.

John Petersen er sannførdur um, at hann verður ein fongur, hóast hann ikki var serliga eyðsýndur í gjár.

– Hann prógvaði, at hann kann bjóða mótstøðumonnunum av, men tað seinasta manglaði hjá honum í dag. Hann fer at vísa, at hann er ein stórspælari eftir føroyskum mátistokki, sigur John Petersen.

Lukasz Cieslewicz fekk sína fótbóltsuppaling í Vági. Sum 16 ára gamal fór hann til Brøndby, og seinastu trý árini hevur hann spælt við Hvidovre í næstbestu donsku deildini.

*uni@sosialurin.fo*

# Púra óroyndur bonkur

Venjararnir hjá B36 framdu onga útskifting í royndini at fáa útjavnandi málið í gjár. Einasti framrættaði spælarin millum útskiftararnar var 22 ára gamli Sigurð Carlsson, sum hevur spælt tríggjar ferðir í bestu deildini.

Hinir vóru Rúnar í Lon Jacobsen, John Hansen og Ámund Nolsø, sum ikki eru drúgvir í bestu deildini.

Tá hevði Heðin Askham, venjari hjá EB/Streymi, munandi fleiri møguleikar. Hann hevði Brian Olsen, Leif Niclasen og Bárð Olsen, sum hava roynt seg á landsliðnum fyrr, umframt unga Arnar Dam, at velja ímillum.